# Leikaløta á Drama-verkstaðnum

Á Dramaverkstaðnum í Havn hava 20 børn og ung knossast dúgliga fyri at verða klár mánadagin tann 10. desember klokkan 18.00, tá Leikaløtan byrjar. Tey, sum framføra, eru millum 10 og 21 ára gomul.  Á skránni eru sjónleikirnir Brúsajøkul og jólini" og "Lítli Gutti". Og so er tað "Søgan" sum altíð plagar at vera , har áskoðararnir sleppa at spæla við, um tey hava hug. Børnini kunnu, um tey vilja, verða máलaði í andlitinum. Atgongumerkir fáast í Kunningarstovuni og í Dramaverkstaðnum ein tíma undan sýning. Dramaverkstaðið liggur í brekkuni niðan á høllina á Hálsi.





















